# BØNARLØTAN

**MAI** **2026** **41. árg.**

***Dýri biðidagur*** ***Jer. 32.1-23***



**OM Føroyar og TeenStreet Føroyar**
**Margareth Djurhuus, landsleiðari**
Í mai er serligt fokus á langtíðartrúboðarar okkara í Japan, Shino og Hall Mortensen. Sí stutt filmsbrot: facebook.com/reel/964346876137105. Biðið fyri verkinum í Japan. Har eru fá trúgvandi, og tað kennist ofta einsligt. Vit fara at kunna um virksemið hjá OM og eggja fólki at vera við í heimsmissiónini. Kunning: info.fo@om.org / 219923. Tilmeldingarfreistin til TeenStreet-leguna er 10. mai fyri tannáringar. Nógv ung eru tilmeldað. Biðið um nóg nógvar leiðarar, serliga kvinnur.
Kunning: teenstreet.fo@om.org el. 219923.

**ZAREPTA**

Várlegan 1.-3. mai. Familjulegur 6.-31. mai. Umvæling og nýgerð av kømurum, vølli og vegi. Kunning: Agnar Josephsen 216357.



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Eg verði á Filipsoyggjum allan mai. Skal rættlesa tríggjar ymiskar umsetingar: tvær av Áp. og eina av Mark. 1-8.

**KRINGVARPIÐ**

10. mai kl. 16.........Sjónvarpsmøti, Lívdin, Hoyvík

**EVANGELISKA RØDDIN – Aldan (meir á www.evr.fo)**

Sunnukv. kl. 21......Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 ..........Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Leygardagur* — *Jer. 32.24-44*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

Í dag kl. 19 verður føroyskt møti í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsg. 2b í Aalborg. Biðið, at Harrin signar Orðið, ið verður talað.



**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 3**

Vit hildu páskir saman við familjuni hjá Daniel í Nebraska. Biðið um trygd á vegunum, sum vit ferðast at greiða frá arbeiði okkara

í ymiskum samkomum í USA, og fyri viðgongutíðini hjá Krissy, sum skal eiga okkara triðja barn í mai.

## *3. Sunnudagur* *Luk. 1.1-25*

### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Vit takka fyri alla praktiska hjálp og stuðul til legurnar í summar. Fyrireikingarnar eru væl ávegis. Páll fer yvir fyrst í mai. Vegna heilsutrupulleikar kemur Marjun ikki við. Biðið fyri okkum og verki Harrans í Suðurgrønlandi, at Harrin sendir yngri kreftir í okkara stað.

### ONGLAND, European Christian Mission
### Dorit og Simon Marshall



Simon verður í Albania saman við trúboðarunum í Albania og Kosovo til *Prayer Days* til 5. mai. Hann verður í Bosnia Herzegovina til 10. mai, har *Prayer Days* verða fyri trúboðarar, ið tæna har, í Serbia og Kroatia. Hann talar í Exeter 17. mai og luttekur á hátíðarhaldi 30. mai í Schwerin, Týsklandi. Tá verða 15 ár, síðani ein samkoma varð stovnað av ECM-trúboðarum.

## *4. Mánadagur* *Luk. 1.26-56*

### Atlantic Mission

20 eru tilmeldað at koma við okkum til **Danmarkar** 24. juli-4. aug. at hava barnatiltøk og evangelisera á gongugøtuni. Loyvi skulu fáast í lag, skrá skal gerast, og luttakarar skulu hava venjing. Vit eru í løtuni átta, ið fara at gera praktiskt arbeiði í leguhúsinum Naalersitaq í **Grønlandi** 5. juni-20. juni. Gott hevði verið, um fleiri komu við. Í mai koma sjey **ferðamannaskip** á Havnina,

fimm til Runavíkar, eitt til Klaksvíkar og eitt til Suðuroyar. Vit geva ferðafólkum traktatir, og vit uppliva, hvussu Harrin er við, og at onkur kemur til trúgv. Tú ert vælkomin at vera við.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein**

*Í dag fyllir Noah Flanagan 17 ár

## *5. Týsdagur* — *Luk. 1.57-80*

**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**




Um páskirnar fekk brævskeiðið yvir 1200 fyrispurningar, ella 4 ferðir so nógvar sum vanligt. Fyrst í mai fer eitt toymi til Eysturturkalands at evangelisera. Biðið, at tey verða væl móttikin og røkka út til mong, og at tey verða samkomuni á staðnum til eggjan. Síðst í mai verður sláturhøgtíðin (kurban Bayram). Biðið, at mong finna vegin til frelsu. Oftast vita turkar ikki, hví teir drepa djórini (ofra neyt og seyð). Hesa tíðina sendir brævskeiðið út bókling um tað veruliga ofrið.

## *6. Mikudagur* — *Jer. 33.1-26*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Vit verða til ymiskar leiðarafundir í Sanford, Florida, til 10. mai. Vit gleðast um, at Krissy, Daniel og børnini vitjaðu okkum í apríl.

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Vit takka fyri heftini um páskaboðskapin, sum vit býttu út. Biðið, at Gud tosar við fólkið gjøgnum Orð Sítt. Vit gera Gal. klárt at geva út og halda fram at endurskoða týðingina og gera hana klára til kanningar hjá umsetingarráðgeva.

*Í dag fyllir Evelyn Poulsen 6 ár

## *7. Hósdagur* — *Jer. 34.1-22*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**



Trúboðaranæmingarnir á North Cotes College fyrireika seg nú at vera fimm vikur í avbyrgdari *off-grid* simulering. Tey skulu venja førleikar, sum tey hava lært um, so sum hvussu ein lærir fremmant mál og mentan. Eitt timburfelag í Sorimi, PNG, ger ein veg, sum nærkast bygdunum hjá sorimifólkinum. Biðið fyri teimum, tí hetta fer at ávirka lívsháttt teirra.

## *8. Fríggjadagur* — *Jer. 35.1-19*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**



Biðið fyri STEVN. Nógvir luttakarar verða á STEVN-ferð allan mai mánað. Vit fyrireika enska STEVN. Biðið fyri talum og samtalum.

**OM, SUÐURAFRIKA,**
**OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**




Henda mánaðin fara næmingarnir á tvær vikur *outreach*. Biðið um einleika, vísdóm og Harrans leiðslu, so fólk uppliva Hann. Tað er nú meiri enn eitt ár, síðan eg kærdi um mítt visum. Eg bíði enn eftir svari.

*Í dag fyllir Terji í Prestgarði 14 ár

## *9. Leygardagur* — *Luk. 2.1-24*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 9**

Tveir mans í samkomuni hava stovnað bólkin *Men's Cornerstone*, har menn møtast regluliga at hava samfelag, stuðla hvørjumøðrum og tosa um, hvat tað vil siga at vera maður í hesum døgum, eisini í ljósinum av Skriftini og evangeliinum. 17 mans komu fyrstu ferð, summir aðrastaðni frá. Biðið, at Gud signar bólkin.

## *10. Sunnudagur* — *Luk. 2.25-52*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 14, Evita 11, Joy 9**

Biðið fyri Rosi, eini kvinnu í samkomuni, sum næstan alt lívið hevur verið bundin at koyristóli. Hon datt í jan. og breyt lærbeinið og hevur verið seingjarliggjandi síðani. Biðið um grøðing, so hon fær flutt seg og sitið uppi, og at hon verður styrkt andaliga hóast ringu støðuna.

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**

## *11. Mánadagur* *Jer. 36.1-16*



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og**
**Jóhannis Frants Poulsen**
Nøkur av húsunum, sum hoyra til bíbliuskúlan og høvuðsstøðina, eru gomul og fáa nú nýggja vatnveiting lagda inn. Hetta er stórarbeiði. Nurimar er nógv upptikin á skrivstovuni. Aðru viku í mai verður hon eina viku í høvuðsstaðnum í arbeiðsørindum. Maco-toymið leggur nú síðstu hond á umsetingina av allari Bíbliuni til ættarbólkin. Bert fáir ættarbólkar fáa alla bíbliuna umsetta.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

**DANMARK, Glostrup Frikirke**

## *12. Týsdagur* *Jer. 36.17-32*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit fara til Wisconsin, nú tvær abbadøtur fáa prógv frá NTM bíbliuskúlanum. Heima skal eg eitt nú undirvísa einum bíbliuflokki í samkomuni. Mikudagar savnast 8 til 10 menn úr bíbliuflokkinum. Vit eta døgurða saman og samtala um ymisk áhugamál.

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Lydia 16**

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

## *13. Mikudagur* *Áp. 1.1-26*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**
Juvel II fer av Klaksvík til Grønlands 14. mai og verður í Nuuk 21. mai. Á hvítusunnu verða vit saman við samkomuni í Nuuk í leguhúsinum inni í Ameralikfirðinum. So byrjar ferðin til bygdir og býir. Biðið, at Harrin leiðir, at sálir verða frelstar, og at tey trúgvandi verða uppbygd. Enn manglar nakað av manning til ávís økir. Kunning: Karsten 285007.

## *Kristi himmalsferðardagur* *Áp. 2.1-28*

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Eftir ein longri steðg hava vit nú aftur bíbliutímar á netinum. Eini fimm úr Qasigiannguit í Norðurgrønlandi hittast í *messenger*-bólki. Biðið um andaligan vøkstur og fyri frálæruni hjá Daniel og tulkingini hjá Solveig, ofta við góðari hjálp frá Lailu.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffia**
**Hans Sivertsen**

Emanuel hevur ongan skipara frá hálvum juni, frá hálvum aug. og allan sept.

## *15. Fríggjadagur* *Áp. 2.29-47*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Páskamøtini vórðu væl vitjað. Biðið, at nógv koma til trúgv. Eitt føroyskt ferðalag við Eyðuni Jacobsen vitjar Calvary Church 17. mai. Biðið um varðveitslu á ferðini.

**FØROYAR**

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Leygardagur* *Jer. 37.1-21*



**Mission Aviation Fellowship,**
**MAF Føroyar**
**Martha og Andrias Hansen**

Vit taka eykaútbúgving í Niðurlondum og hava samband við MAF International. Vit skulu arbeiða í landi ávikavist í Afrika og Asia. Bæði londini hava tørv á flogskiparum. Vit biðja, at Gud leiðir, so at vit taka røttu avgerðina.

*Í dag fyllir Marianna Mora 1 ár

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 14, Petra 11**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

## *17. Sunnudagur* — *Jer. 38.1-28*



**Logos Hope, OM Føroyar**
**Margareth Djurhuus, landsleiðari**
19. mai siglir skipið úr Spania til Niðurlond. 23. mai fer Dánjal Klæmintsson úr Hebron í Leirvík við sum maskinmaður í tríggjar mánaðir og kemur heim til Føroya við Logos Hope 27. august. Biðið fyri manning og vitjandi, um frelsu og umbroyting. Vit eru á *Atlantic Fair* messuni í Klaksvík 19.-21. mai. Vit kunna um tænastuna og leita eftir fólki til brúnna og maskinuna. Skriva til info.fo@om.org el. ring 219923 at fáa kunning, um tú hevur ein frítúr.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Mánadagur* — *Jer. 39.1-18*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**
Í juli missa vit sunnudagsskúlahølini, tí hotellið, vit leiga, verður selt. Næstan 50 børn ganga í sunnudagsskúlanum. Vit søkja Harran um eina loysn.

## *19. Týsdagur* *Luk. 3.1-18*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Biðið, at Gud signar verkið, og at børnini á leguni hava opin hjørtu fyri Orði Guds, at nógv børn og ung koma á legu, at starvsfólk, ið elska Jesus, koma, og biðið fyri fíggjarligu støðuni.

## *20. Mikudagur* *Luk. 3. 19-38*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 2, Salome 2**
Vit hava mist vanliga internetsambandið, men kovolmálmenningin gongur væl kortini. Ráðgevar koma við flogfari. Skúlin er nú liðugur, og lesibrillur eru tøkar. Kovolfólkið, sum einki skriftmál hevði, kann nú byrja at lesa Bíbliuna á egnum máli.

## *21. Hósdagur* *Jer. 40.1-16*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**
Vit hittu familju og vinir á túrinum í Føroyum. Vit gleddust um at vitja fleiri samkomur og merktu hjartalag og gestablídni. Biðið fyri samkomuvikuskiftinum í mai, sum knýtir saman samkomuna í einleika og styrkir og eggjar hana.

*Í dag fyllir Rio Mortensen 7 ár

## *22. Fríggjadagur* *Jer. 41.1-18*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 14, Emma 9**
23. mai skipar samkoman fyri einum fótbólts-/barnatiltaki. Øll børnini í økinum luttaka. Foreldur, ommur og abbar koma at hyggja. Hetta er gott høvi at kunna um samkomuna og koma í prát við nógv fólk.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**

*Í dag fyllir Judah Flanagan 11 ár

## *23. Leygardagur* *Jer. 42.1-22*

**MEKSIKO, Maravito**
**Isabel og Edy Mora**
**Marianna**
Biðið fyri Stephanie og Daniela, sum hava stóran áhuga fyri Bíbliuni og eru søkjandi, at Guds Orð festir seg í hjørtuni.

*Í dag fylla Nya Flanagan og Hanna Sharp 18 ár

## *Hvítusunnudagur* *Luk. 4.1-21*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Noah 17, Karis 12, Judah 11, Ethan 8**

Biðið fyri Mengen-samkomuni. Patur, ein av okkara ungu bíbliulærarum, stríðist við varandi sjúku. Grimdarregn oyðileggur garðar og elvir til matartrot. Simon hevur havt ryggtrupulleikar í seinastuni. Biðið fyri Nya og Noah; vit síggja tey so sjáldan. Vit vóna at ferðast í summar øll familjan á fyrsta sinni, síðan vit komu til PNG. Noah og Judah skulu endurnýggja pass og fáa visum.



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 6, Olivia 2**

## *2. hvítusunnudagur* *Luk. 4.22-44*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**



Vit hava nú bíbliutímar, hóast Wendy og Erik eru farin til USA. Ungi umsetarin og aðrir menn leiða løturnar, og eg lesi úr NT. Ein bólkur møtist hjá mær hvønn morgun, mánafríggjad. Vit lesa evangeliini og Áp. Hetta er síðsta ræ ttlesing, áðrenn tað skal gerast klárt til prent. Vónandi verða 1. og 2. Kong. prentaðar í juni. Nógv er at fáa frá hondini. Biðið um vísdóm, styrki og heilsu. Sera heitt er í løtuni. Eygnaskurðviðgerðin hjá unga umsetaranum er útsett til juni.

## *26. Týsdagur* *Jer. 43.1-13*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 17**

Vit verða í Føroyum 5. juni-8.juli. Vit vóna at síggja so nógv tykkara sum møguligt. Minnist arbeiðið í Dakar. Tørvur er á fleiri fólkum, og biðið fyri leiðsluni her, at Harrin leiðir, varðveitir og styrkir.

## *27. Mikudagur* *Jer. 44.1-14*



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 3, Jóanes 0**
Kvinnumøtini, vit byrjaðu í heyst, hava verið hvønn mánað síðani, og tey hava verið væl vitjað, einir 30-50 gestir. Tað er gleðiligt at síggja nýggj andlit í samkomuni. Um sama mundið byrjaði eisini bíbliubólkur fyri menn, ið nú er aðruhvørja viku. Um 15-20 luttaka regluliga.

**Susan og Øssur Berghamar**

## *28. Hósdagur* *Jer. 44.15-30*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Vit hava í tvey ár undirvíst og fyrireikað næmingar til at tæna Harranum út frá samkomu síni ella aðrastaðni. Vit høvdu nú seinasta fundin við teir, áðrenn vit fara til Kanada 1. juni. Ymiskt er at avgreiða, áðrenn vit fara avstað. Vit hava eisini gjøgnumgingið Rómbrævið saman við teimum, ið vit arbeiða tætt saman við.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**

## *29. Fríggjadagur* *Luk. 5.1-20*

### DANMARK, Frikirken Bindslev, Jylland

Fleiri børn savnast til sunnudagsskúla hvønn sunnud. Onkuntíð kemur okkurt barn við, sum ikki hoyrir Orð Guds vanliga. Biðið fyri sunnudagsskúlanum.

### TEILAND, Chiang Mai
### Corine og Sørin Joensen
### Aron 14, Noah Kristian 11

Vit vitja í Føroyum fyrstu tríggjar vikurnar í juni. Biðið fyri familju okkara, fyri okkara heilsu og trygd.

## *30. Leygardagur* *Luk. 5.21-39*

### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen
### Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 7

Vit eru nú leiðarar í samkomuni. Okkum tørvar forbøn og Guds leiðslu. Vit vilja byrja væl, læra nógv og taka rættar avgerðir við dirvi.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## Kristus livir í tær

Hvat er leiklutur Heilaga Andans í lívinum hjá trúgvandi? Og hvussu skulu vit brúka gávurnar, vit hava fingið?



David W. Gooding vísir á Heilaga Andan sum tann, ið leiðir okkum gjøgnum lívið og formar okkum eftir myndini av Syni Guds. Hann gevur okkum eisini gávur – ikki bert til okkum sjálv, men til at tæna øðrum í kærleika.

Lurta ella tak niður tekstin sum pdf, eBook ella Kindle:
www.myrtlefieldhouse.com/sermons/christ-living-in-you#read

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!